# KUNNGERÐ NR. 54 FRÁ 3. MAI 1994 UM AT LEGGJA EFTIRLITS- OG UMSITINGARUPPGÁVUR EFTIR UMHVØRVISVERNDARLÓGINI TIL UMHVØRVISSTOVUNA, SUM BROYTT VIÐ KUNNGERÐ NR. 90 FRÁ 28. SEPTEMBER 2007

**Kunngerð nr. 54 frá 03.05.1994**

Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

Nr. 54 3. mai 1994

Við heimild í § 35, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd hevur landsstýrið fyrisett:

**§ 1.** [1)] Niðanfyri nevndu eftirlits- og umsitingaruppgávur hjá landsstýrinum verða lagdar til Umhvørvisstovuna:

1) Góðkenna heildarætlanir fyri spillvatn og geva boð sambært § 18, stk 2, taka upp samráðingar sambært § 18, stk 3 og gera reglur um innihaldið av ætlanunum sambært § 18, stk. 4,

2) taka avgerðir sambært § 20, stk. 1 og 2,

3) krevja mál um útstykking freistað sambært § 25,

4) taka avgerðir í málum viðvíkjandi serliga dálkandi virkjum, v.m. sambært § 26, stk. 3, § 28, 29, § 32 og § 34, stk. 1, 2, 3 og 5,

4a) [1)]hava eftirlit við treytum í loyvum og góðkenningum sambært § 36, nr. 3,

5) atgongd til almennar og privatar ognir sambært § 39,

6) umbønir um upplýsingar eftir § 40 stk. 1 og boð um at fremja kanningar ella lata tilfar eftir § 40, stk. 2,

7) hava eftirlit við dálkingarstøðuni í landinum sambært § 42,

8) broyta treytirnar fyri góðkenningina ella loyvinum hjá einum virki eftir § 46,

9) fremja kortlegging av óljóði sambært § 48, stk 1,

10) fremja kortlegging av dálkingarstøðuni og trýstið frá teimum einstøku dálkingarkeldunum sambært § 49,

11) fremja kortlegging av luftdálkingini sambært § 50,

12) gera eina ætlan fyri góðskuni av vatnøkjunum í landinum sambært § 53,

13) gera ætlan fyri støðu av virki v.m. sambært § 54,

14) gera kortlegging av fyribeiningini av burturkasti sambært § 56, stk. 1 og gera reglur eftir § 56, stk. 2,

15) gera ætlan um fyribeining av burturkasti sambært § 57, stk. 1, og taka avgerð ella gera reglur sambært § 57, stk. 2, gera reglur um burturkastskipanir sambært § 57, stk. 3, taka avgerð ella gera reglur um skyldur kommununnar at stovna ella fara upp í felagskommunalar fyritøkur sambært § 57, stk. 4, og áseta avgjøld eftir § 57, stk. 5.

**§ 2.** [1] Landsstýrið kann geva Umhvørvisstovuni nærri boð um, hvussu eftirlits- og umsitingaruppgávurnar, sum eru lagdar til starvsstovuna, skulu útinnast.

*Stk. 2.* [1] Landsstýrið kann gera av í hvønn mun umsóknir, sum eftir higartil galdandi reglum skulu avgreiðast av landsstýrinum, skulu avgreiðast av Umhvørvisstovuni.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

---

## Endanotur

[1] Broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, har § 15 er soljóðandi: "Henda kunngerð kemur í gildi 1. oktober 2007.